## Todi ímóti Jaap Stam

Í kvøld spælir Start ímóti hollendska stórfelagnum Ajax, og líkt er til, at Todi skal byrja í álopinum hjá Start. Dysturin millum Start og Ajax er í UEFA Cup, og hann verður spældur á leikvøllinum í Kristianssand í kvøld. Blaðið Fedrelandsvennen heldur seg vita, at Todi Jónsson skal byrja í álopinum hjá Start í dystinum í kvøld. Í verjuni hjá Ajax sleppur Todi at dystast við ein risa í hollendskum fótbólti seinastu 10 árini. Jaap Stam, sum hevur spælt fyri Manchester United og AC Milan er nú verjuálit hjá Ajax, og tað verða uttan iva nakrir nærdystir millum hann og Toda í kvøld.




## Risin er vaknaður

AGF hevur nú fingið gongd á sítt spæl í næstbestu donsku deildini. Um vikuskiftið vant AGF burtur úr Lyngby, og í gjárkvøldið fekk felagið hjá Andrew av Fløtum av at vita. AGF spældi á útivølli ímóti Fremad Amager og vann dystin 4-1. Peter Grauluns skoraði fyrstu trý málini í dystinum. Thomas Christensen minkaði so fyri AGF, áðren Anders Kaagh gjørdi seinasta málið hjá AGF. Andrew av Fløtum hevur ikki spælt við hjá Fremad Amager í ár orsaka av skaða, og hann var heldur ikki við í gjárkvøldið

# KÍ-kvinnurnar skrivaðu søgu

**Kvinnuliðið hjá KÍ vann mikukvøldið sjeynda føroya-meitaraheitið á rað, og tær eru nú mest vinnandi kvinnuliði í føroyskum fótbólti nakrantíð**

FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Mikukvøldið hevði kvinnuliðið hjá KÍ møguleikan at tryggja sær føroyameistaraheitið 2006. Liðið skuldi vinna dystin ímóti næstfremsta liðnum, sum er GÍ, og tað kláraði KÍ.

GÍ legði væl fyri í dystinum, og fyrsta hálva tíman var tað líka nógv GÍ, sum søkti at KI-málinum sum øvugt. Men seinasta korterið av fyrra hálvleiki kom KÍ rættiliga fyri seg, og innanfyri tveir minuttir stutt fyri hálvleikssteðgin skoraði KÍ tvær ferðir.

Fyrst var tað Kristina Eyðbjørnsdóttir, sum stútaði eitt hornaspark í málið, og Malena Josephsen brúkti eisini høvdið, tá hon sendi eitt innlegg í málið tveir minuttir seini.

### GÍ fekk eisini mál

KÍ legði betur fyri enn GÍ í seinna hálvleiki, og fýra minuttir eftir steðgin økti Vivian Bjartalíð til 3-0.

GÍ minkaði við góðar hjálp frá KÍ-málmanninum. Randi Wardum rakti Honnu Isaksen við einum útsparki, og bólturin hevði beina kós í málið. Undir hørðum trýsti frá júst Honnu, eydnaðist tað Randi at fáa bóltin aftur, men hon fekk ikki sligið bóltin burtur frá vandakós, og so var 3-1.

Tað gingu bara fáir minuttir, so svaraði KÍ aftur við besta málinum í dystinum. Kristina Eyðbjørnsdóttir snýtti ein verjuspælara og stakk inn um verjuna til Vivian Bjartalíð, sum sendi flatt í málið.

GÍ minkaði til 4-2, tá Hanna Isaksen sendi eitt gott skot í málið út 18 metra fjarstøðu. GÍ hevði eisini aðrar royndir á málið og onkur stórur kjansur var, men dysturin endaði 4-2 til KÍ.

### FM er heima

Við sigrinum í gjárkvøldið er KÍ so langt frammanfyri hini liðini í kvinnudeildini, at eingin fær KÍ aftur í seinastu umførunum. KÍ hevur tríggjar dystir eftir at spæla, og seinasti dysturin verður spældur á Argjum leygardagin 23. september, tá KÍ-kvinnurnar eisini fáa gullið handað.

Hetta er sjeynda FM-heitið á rað, sum kvinnurnar hjá KÍ vinna, og samanlagt hava tær vunnið átta føroyameistaraheiti.

KÍ og HB hava seinasta árið staðið á jøvnum við sjey meistaraheitum í part, men í gjárkvøldið fór KÍ fram um HB við átta meistaraheitum. Hetta hevur verið leingi á veg, tí síðani 2000 hevur KÍ verið nógv tað sterkasta liðið í føroyskum kvinnufótbólti, og KÍ hevur vunnið meistaraheitið øll árini síðani.




*KÍ-kvinnurnar eru framvegis sterkasta kvinnuliðið í landinum. Liðið vann í gjárkvøldið føroyameistaraheitið, og fyrr í ár vann liðið eisini steypakappingina*

*Mynd: Norðlýsið*





**Varaleiðari hjá Baresso Coffee**

**SMS letur upp nýggja Baresso café 25. oktober, og í tí samband søkja vit álítandi fólk til caféina. Starvið sum varaleiðari er frá 1. oktober 2006.**

**Saman við leiðaranum hevur tú sum varaleiðari ábyrgdina av ráðlegging og útinning av dagligum uppgávum, tryggja ein skilagóðan rakstur av espresso og kaffistovuni fíggjarliga og viðvíkjandi góðsku, tænastu og reinføri. Við egnum áhuga og skilagóðum mannagongdum tænir tú okkara gestum og hevur ábyrgdina av, at nýggir starvsfelagar fáa ta vitan og venjing, ið krevst fyri at tryggja kaffistovuni ein skipaðan og væl virkandi rakstur.**

**Sum varaleiðari hevur tú verið í venjing hjá Baresso Coffee og fingið starvsfólkaheiðursbræv, áðrenn tú fer í gongd við varaleiðaravenjingina. Tú verður vand/ur upp í teimum ymsu uppgávunum, ið tú fært ábyrgdina av – ein veningarskrá, ið er samansett av ástøði og starvslæru. Eisini her er tað tín vilji og góði hýrur, sum við hjálp frá okkum fær alt til at eydnast væl. Hevur tú spurningar viðvíkjandi arbeiðinum, kanst tú ringja til Anju á tel 210990**

baresso COFFEE

SEND UMSÓKN TIL : BARESSO • SMS • Á TRAPPUTRØÐNI • POSTBOKS 1059 • 110 TÓRSHAVN


## Holst er í landsliðsformi

**Christian Lamhauge Holst skoraði bæði málini, tá ið Lyngby við 2-1 sigri í gjárkvøldið helt fast um oddastøðuna í donsku 1. deild**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*

Christian Lamhauge Holst var rættiliga í miðdeplinum, tá ið Lyngby spældi dyst í donsku 1. deild í gjárkvøldið.

Lyngby var á heimavølli ímóti Ølstykke og vann dystin 2-1. Holst, sum byrjaði dystin í álopinum, gjørdi bæði málini hjá Lyngby. Fimm minuttir eftir hálvleikssteðgin legði hann Lyngby fram um 1-0, men eftir ein góðan tíma javnaði Ølstykke.

So mátti Christian Lamhauge Holst manna seg upp aftur, og fimm minuttir fyri leiklok gjørdi hann sigursmálið fyri Lyngby. Beint eftir hetta lat hann seg skifta út sum matchvinnari.

Sigurin hjá Lyngby hevur við sær, at liðið framvegis liggur ovast í næstbestu donsku deildini. Lyngby hevur 16 stig fyri 7 dystir.

### Landsliðið ein møguleiki

Christian Lamhauge Holst er hálvur føroyingur, og hann hevur tvær ferðir spælt á føroyska fótbóltslandsliðnum. Síðani venjingarlegu í Spania tíðliga í 2004 hevur hann ikki verið tað sæð aftur á landsliðnum.

Hann segði tó við Sosialin herfyri, at føroyska landsliðið var framvegis eitt av málunum hjá sær, og hann roknaði við, at um hann helt fram at spæla væl fyri Lyngby, so fór hann at fáa landsliðsboð aftur.

Og ikki kann sigast annað, enn at Holst veruliga ger um seg í donskum fótbólti í løtuni.